# DAGSINS MEINING

## Sendið ST-eygleiðarar til Miðeystur

Tað tykist at vera skrúvan uttan enda – stríðið millum ísraelar og palestinar. Hetta økið hevur alt ov leingi verið ein deyðans pallur. Hóast ótaldar royndir at fáa frið, so stendur stríðið við og bara versnar. Ein atsókn hevur uppaftur eina hevndaratsókn við sær. Tað tykist sum eingin endi er á hesum meiningsleysa stríði, sum krevur fleiri og fleiri sivil offur.

Ein spurningur, sum av og á hevur verið frammi, men sum oftast verður tagdur burtur aftur, er hjáveran av ST-eygleiðaraliðnum í teimum økjunum í Ísrael og palestinsku økjunum, har harðast leikar á. Hetta hevur leingi verið eitt ynski frá palestinum og mongum av teimum londum, sum hava roynt seg sum meklarar millum partarnar. Men higartil hava Ísrael og høvuðsstuðul tess, USA verið ímóti eini slíkari ætlan.

Nú heitir so ST-aðalskrivarin inniliga á stjórnirnar í Ísrael og USA um at góðtaka, at eitt lið av ST-eygleiðarum kann verða sent til økið. Tað er greitt, at eitt slíkt ynski hevur stóra undirtøku í øllum heiminum, og tí er óskiljandi, at USA, sum fyrr hevur roynt at fáa partarnar at binda frið og finna eina sømiliga loysn á hesum syndarliga stríði, nú aftur fer upp á bakbeinini. Tað er eisini løgið, at USA, sum hevur eina ábyrgd í hesum partinum av heiminum, ikki minst tí tað letur so stóran stuðul til Ísrael, als ikki vil hjálpa til at finna eina loysn. Tað er vón okkara, nú ST-aðalskrivarin enn einaferð er komin við eini inniligari áheitan á USA, at landið livir upp til ta ábyrgd tað hevur í heiminum og tann leiklut tað hevur tikið sær at tryggja friðin.

Vit bera ótta fyri, at nýggi amerikanski forsetin hevur ikki gjørt sær greitt, hvør vandi er á ferð, um ikki partarnir í Miðeystri sessast aftur við samráðingarborðið og finna eina loysn. Tað tykist sum Bush og hansara fólk í ávísum førum hava latið eyguni aftur fyri tí, sum fyriferst úti í heimi. Forsetin vil heldur halga tíð og orku sína til eina rakettverjuskipan, sum rætt og slætt er »hol í høvdið«. Heldur átti landið at brúkt orkuna uppá at verið við til at loyst trætur og kreppur úti í heimi. Hesar eru ein nógv størri hóttan móti heimsfriðinum enn tær hóttanir, sum Bush sær fyri sær í sambandi við rakettverjuskipanina. Tað einasta, sum í dag kann loysa upp fyri kreppuni í Ísrael, er tí ein »uppílegging« frá USA, sum jú hevur neyðugu styrkina bæði so og so, og her er uppskotið hjá ST-skrivaranum um eitt ST-eygleiðaralið ein byrjan.

**Sosialurin**

# VIÐMERKINGAR

## Ein verð uttanfyri Havnina

**Bill Justinussen**
*Miðflokkurin*



Nakrir tankar um íbúðarneyð og almenn arbeiðspláss í Havn

Tað búgva slakir 30.000 føroyingar uttanfyri Havnina. Allíkavæl tykist tað, sum um fólk í Føroyum eru heimleys, fáa tey ikki tak yvir høvdið í Havnini. Høvuðsorsøkin til íbúðarneyðina í Havnini eru tey mongu almennu arbeiðsplássini og skúlarnir, har eru, umframt at tilflytingin er størri enn vøksturin í íbúðarútboðnum. Hví skulu hesi 18.000, sum búgva í Havnini, hava so nógv lættari atgongd til almennar stovnar og tænastur enn vit onnur 30.000?? Væl veit eg, at Havnin er størst, men so stór er hon heldur ikki, at tað ikki ber til at flyta nakrar tænastur og stovnar útum bøgarðarnar til onnur støð. Flytið almennar stovnar útum Havnina, so minkar íbúðartørvurin í sama mun.

### Eitt gott dømi

Nýggi heilsurøktarskúlin á Tvøroyri er gott dømi um, at væl ber til at hugsa útum Havnina. Hevði hesin skúlin eisini ligið í Havn, hevði íbúðarneyðin verið tey uml. 30-60 fólkini størri. Men nú trýsta hesi ikki íbúðareftirrspurningin í Havnini upp. Og eg havi ikki hoyrt eitt orð um, at tað gekk striltið at fáa næmingar og lærarar til skúlan. Einans tá landsstýrismaðurin fyri lítlum ári síðani kunngjørdi sína avgerð av tingsins røðarapalli, ristu mong við høvdinum og væntaðu ikki ein einasta næming. Heldur vildu fólk fara í útlondini enn til Suðuroyar, ljóðaði. Men nú er alt tað skvaldrið gloymt. TAÐ BER VÆL TIL at hugsa útum Havnina! Og samstundis at lætta um íbúðar-trotið í høvuðsstaðnum.

### Stuðul til íbúðarbygging

Samstundis sum miðfyrring av almennum tænastustovnum fer fram, eigur Havnin at útbyggjast í takt við samtíðina. Í samrøðu við ein fjølmiðil herfyri helt avvarðandi landsstýrismaður, at stuðul til íbúðarbygging ikki var nøkur gongd leið, tí stuðulin vildi bara enda í lummanum á útleigarunum heldur enn at koma teimum við íbúðartroti tilgóðar. Hetta er júst sami primitivi hugsunarháttur, sum fíggjarmálastýrið hevur um rentustuðulin. Men hetta er bara ikki rætt! Stuðul til íbúðarbygging kann saktans koma teimum tørvandi til hjálpar. Íbúðarmál er ein spurningur um útboð og eftir-spurning. So leingi, sum eftirspurningurin er størri enn útboðið, vil prísurin vera ov høgur. Um útboðið hinvegin við almennum stuðli kann gerast størri enn eftirspurningurin, vilja tey, sum leiga út, skjótt undirbjóða hvønnannan í staðin fyri sum nú, at leigararnir yvirbjóða.

Sostatt kann ein skilagóður stuðul til íbúðarbygging vera við til at minka um tað alt ov høga prís-støðið. Og verður so ein partur av Havnini samstundis lagdur út á bygd, kann javnvágin í føroyskari búseting betrast.

## Hungur og hall og maktarloysi!

**Hans B. Hansen**

Eg havi uppliva hungur/-hall/maktarloysi/fallin um í kommunalari íbúð/tá alt mól fyri einum/og ein fekk at kenna veikleikan/tá kroppurin brendi nógv feitt!

Eg havi stríðsvilja/viljastyrki/dirvi/áræði/sjálvsálit i/ yvirliva meg sjálvan, fleiri ferði tá ein var nær deyðan, í kommunalari íbúð í eysturbýnum í Havn!

Eg havi síðani lært hvussu hart tað er at kenna hungur/hall/maktarloysi/tá ein fall um í kommunalari íbúð/tá sveittin dróg av einum, ið bleiv dýggjvátur!

Eg havi kunna lívbjarga mær við ernering/kosttilskoti/ið kroppurin harðliga tørvaði skuldi ein yvirliva hungur/hall/maktarloysi í kommunalari íbúð!

Eg havi bert mær sjálvum at takka fyri og teimum ið stuðlaðu einum fíggjarliga/moralskt og við kosti, ein síðani hevur fingið samsýna teimum tað aftur!

Eg havi í slíkum føri mist nógv pund og tá ein síðan leitaði til kommunulæknan segði hesin at ein sá gott út, ið ikki visti hvat ein hevði verið fyri!

Eg havi við hjálp av ernering/kosttilskoti vunnið á arvafíggindum, og fingið størri heilsubót og økta vælveru/síggja gott út og kenna seg væl fyri!

Eg havi hildið lívið vera meiningsleyst og lívstilveran tóm/innihaldsleys eins og eitt hylki, síðan fann ein út av at skapa sær eydnuna sjálvur!

Eg havi skapt nógv í trá av tí ein er blivin í almennum eygum, tá ein hevur tikið lut í kjakfundum og stutt og greitt sagt sína meining!

Eg havi erliga og opið greitt frá tí lívslanga arvastríði/dagliga lívi/fatanir/hugsanir/kenslur/upplivingar/meiningar/daglig fyribrigdir!

Eg havi sæð at tað loysti seg at stríðast ímóti øllum arvafíggindum ein heldur áfram við!


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




VIÐMERKINGAR

## Er løgmaður sárbarur ella politisk snildur?

**Oddur Hentze**

Stúrsaði við tá ið eg hoyrdi, at løgmaður hevði fingið eitt bræv við óvart. Ikki so nógv óvart, men at hann helt við hesum brævið, var ein samskipað herferð ímóti honum sett í verk.

### Sárbarur

At nøkur fólk ditta sær at skriva nøkur lesarabrøv, um hvussu fullveldið skal náast og um hetta ikki er í samsvar við meiningarnar hjá løgmanninum, kallar løgmaður eina samskipaða herferð ímóti sær?

Serstakliga góður biti fyri Javnaðar- og Sambandsflokkin, sum sita og gníggja hendur av hesum »ágangisbrævið«. Orð sum ráðagerð, avdúking, samskipanarskriv, undirgraving, loynidómar og stungin í ryggin, hava verið nýtt í hesum sambandi.

At vera ósamdur við Løgmann í einum so objektivum máli, kann ikki metast at vera ágangur av nøkrum slag, tá er man ov sárbarur at vera landsins leiðari.

### Politiskt snildi

Eg havi altíð mett løgmann vera siðiligan, samarbeiðsvilligan og dámligan millum fólk, óansæð politiskan lit, men hetta seinasta árið sær tað út til, at onkur hevur tutlað honum í oyra, at hann skal royna at markera seg meir sum talsmenn fyri Fólkaflokkin og ikki sum talsmann fyri samgonguna og Føroya Løgting.

Á ein ella annan hátt er hann dottin fram á eitt bræv, sum var ætlað einum heilt øðrum persóni. Hetta bræv hevur hann kanska mett sum ein funnin fressur, sum kann brúkast sum eitt tjóvstartað valstríð.

Og so fer løgmaður út til Føroya fólk og sigur, at tingmenn í hansara egnu samgongu eru partar av hesari sokallaðu herferð og við hesum roynir hann at billa fólki inn at ágangur frá øðrum tingmonnum í samgonguni (tó ikki úr Fólkaflokkinum) eru óseriøsir og mótarbeiða honum. Løgmaður gloymir, at hann er andlitið úteftir hjá allari samgonguni og ikki bara fyri seg sjálvan. Hann hevur kastað ein stein, og tað kann henda, at hesin kemur at raka hann sjálvan. Frílyndið, frælsið, demokrati og lesarabræv eru varðar í okkara samfelag, sum løgmaður ikki átti at brotið niður men heldur at hjálpa til at byggja upp.

## Tak Kjartan

**Hans Jensen, Hvalvík**

I disse ulvetider, hvor de psykisk syge bliver smidt på gaden i sommerferien, rullestolen sparket væk undir de handikappede, skoler og sygehus kørt i sænk for at få penge nok til vores folkevalgtes helt rimelige, men alt for beskedne efterløn – er det opløftende at konstatere, at der stadig findes uselviske, selvopofrende altruister, som dig.

Folk som helt uden bagtanker er parat til at give analfabeter, de der har sovet i skolen, de motoriske handikappede og de mange, der er politisk afsportet – en chance. Det er så smukt, rørende og tåreværldende, at man får livsmodet tilbage.

Da det hurtigt kan blive et uoverskueligt arbejde – vi er jo mange af ovenstående – vil jeg diskret foreslå Amnesty-modellen. D. v. s. en standard protest, som vi så kan underskrive. Ja – jeg mener selvfølgelig sætte vores fingeraftryk under – vore åndelige færdigheder er jo stærkt begrænsede.

Til sidst vil jeg helt konkret bede dig om hjælp i en sag, jeg har tumlet med de sidste par dage. Der er en lækage i kølevandssystemet i min båd. Jeg kan ikke finde fejlen, men at Anfinn Kallsberg har skylden, tvivler jeg ikke et øjeblik om. Var det muligt at få tilsendt et udkast, der kraftigt insinuerer, at han har svigtet meningmands interesser, kastet sig i grams for de danske imperialister og saboteret mit kølevandssystem?

Endnu engang: Tak for dit smukke initiativ. Man får troen på den menneskelige godhed tilbage.

Venlig hilsen.

P.s. Kunnne du ikke som et indledende eksperiment, forsøge at redigere læserbrevene fra Zakarias Wang. Manden er lynende intelligent, men han duer ikke at formidle sit hellige budskab, så vi almindelige dødelige har en chance. Brevene efterlader et indtryk af rendyrket galskab – og det er jo synd, at en sådan intellektuel kapacitet skal misforstås af sin samtid.

P.P.S. Hvornår kommer den nye CD med Høgni. Jeg er vild med hans top hit: I hate te Danes Blues.

It was early in the morning, baby

And the danes don’t treat me no gooood.

Well, it was.......ect

## Jóhan Mortensen tænir útlendingum

**Hans J. Hermansen**



Í Fregnum fyri ólavssøku skrivar ein av okkara fremstu vinnulívsmonnum, mentunarmonnum og býráðsaspirantur, nevniliga Johan Mortensen, eina undarliga grein móti stórhvalaveiðu. Hann hevur av einari ella aðrari merkiligari orsøk fingið marruna av hesum máli, sum liggur í dvala í løtuni. Niðurstøðan er stutt, at gera vit, so sum onnur krevja, so skulu vit óivað liva leingi og eydnurík í okkara egna landi.

Hann, ið kennir bara eitt lítið sindur til tað, sum er hent í spurninginum um okkara grindadráp, veit, at tað hevur ikki skatt okkara umdømi uttanlands, tvørturímóti. Fiskaútflutningurin fekk tað betri, tá ið »mentaðir« umhvørvisbólkar sum EIA, WDCS og Sea Shepherd fóru undir eina miðvísa lygiherferð móti grindadrápinum. Tað átti tú at vitað. Hví skuldi stórhvalaveiða skatt okkum meiri?

Um tú heldur røttu uppskriftina vera, at vit skulu dansa eftir tí tónleiki, sum bretar ella onnur mentað fólk aðrastaðni leggja á, verður stevið í framtíðar dansi óivað annað enn tað, ið føroyingar sjálvir høvdu ætlað sær at trott. Vit koma stutt, um vit skulu lata við halanum, hvørja ferð ein útlendingur letur munnin upp, men hetta er ikki nýtt føroyskt fyribrigdi. Soleiðis hava vit livað til denna dag, og eftir øllum at døma ætlar tú, at soleiðis skal tað vera. Bert lúsin útlendsk er_

Tað, sum tú í nevnda brævi tykist umboða, líkist nógv tí, sum vanliga verður skýrt sum synd, og sum alment hevur verið fornoktað, men sum kortini hevur hevur megnað at yvirliva frá fyrsta degi, nevniliga prostitutión. Hví skulu bretar ræðast tøl frá vísindaligum kanningum, uttan so at teir hava eitt fjalt endamál við tí, men skjóta seg inn undir umhvørvi og náttúruvernd? Er oljuvinna umhvørvisvernd? Hvør eigur rættin til oljuna, vit ella okkara eftirkomarar?

Tú nevnir burðardygga og kommersiella veiðu. Hví er kommersiell hvalaveiða verri enn kommersiellur fiskiskapur, kommersielt neyta-, svína-, seyða-, snigla- ella høsnarungahald? Kravið til alla veiðu eigur at vera, at stovnurin er ikki hóttur, at fongurin fer til matna, at drápshátturin er mannsømiligur, og at djórini hava tað gott. Tað, ið tú óivað hugsar um, er veiða við íðnaði fyri eyga, og tað er nakað heilt annað.

Størri mannamuni skalt tú leita leingi eftir, um tú heldur, at inuittar og onnur skulu sleppa at drepa hval, tí tey hava gjørt tað í øldir. Spyr teir bara, tað havi eg gjørt. Skulu teir sleppa at drepa hval, tí teir síggja øðrvísi út? Eru teir minni mentaðir enn vit?

Nei, Johan, kom niður á jørðina, og vev ikki alt upp í ein vavgreyt. Lat vera við at spilla íslendingar, norðmenn, japanesarar og onnur út og soleiðis verja ensk áhugamál. Um mutur hevur verið brúkt nakrastaðni, er tað innan fyri IWC. Hesin stovnur, sum hvalaveiðutjóðir stovnaðu fyri meiri enn fimmti árum síðan fyri at verja hvalastovnin, er í dag við mutri yvirtikin av pasta- og ostaframleiðandi londum, ið bara vilja steðga hvalaveiðu, tí hvalurin er so fittur, so klókur, og tí tað er synd at drepa hann.

At enda fái eg lítið samband millum tína politisku áskoðan — um hon er ikki broytt síðan seinasta býráðsval — og ta undirbrotligheit, tú sýnir við tínum hugburði. Við hasum verða vit trælir í egnum landi – altíð!

Og by the way, er SAS tann rætti at nevna, tá ið tað snýr seg um rættlæti?

Alt annað ósakligt um persónar og lond duga fólk óivað sjálv at meta um.

Sorry, Johan, tú setti kikaran fyri blinda eygað, siktaði skeivt, skeytst og rakti ikki — vóru tað harraboð úr Bretlandi? Ella roy ndi tú bara at tekkjast teimum?

